

Skrivstovustjórin fær nógvar uppgávur

Uppgávurnar hjá stjóranum á løgtingsskrivstovuni eru ásettar í tingskipanini, sum verður galdandi frá á ólavsøku. At seta nýggja stjóran verður ein av fyrstu uppgávunum hjá formansskapinum í løgtinginum, sum verður valdur á ólavsøku

Fyrrapartin í farnu viku var lýst í bløðunum eftir stjóra á løgtingsskrivstovuni. Nýggi skrivstovustjórin skal taka við eftir Kristoffur Thomassen, sum 1. september fer frá vegna aldur. Kristoffur Thomassen hevur verið skrivstovustjóri hjá løgtinginum, síðani starvið varð sett fyrstu ferð 1. apríl 1987

Lýst í tingskipanini

Arbeiðssetningurin hjá stjóranum á løgtingsskrivstovuni hevur ikki verið skrivaður í tingskipanini, sum hevur verið galdandi higartil. Kristoffur Thomassen hevur arbeitt eftir uppgávum og heimildum, sum vórðu ásettar í starvslýsingini.

Løgtingið hevur samtykt nýggja tingskipan at koma í gildi á ólavsøku, og í henni eru starvsøkini hjá skrivstovustjóranum og løgtingsfyrisitingini annars fest á blað.

Lýsingin í bløðunum er grundað á tað, sum samtykta uppskotið um nýggja tingskipan sigur um skrivstovustjóran. Tó verður einki sagt í lýsingini um, at skrivstovustjórin sambært grein 22 í nýggju tingskipanini ikki kann vera løgtingsmaður. Sama grein sigur, at skrivstovustjórin kann ikki hava størv og álitisstørv í almennari tænastu ella borgarligari vinnu, uttan at formansskapurin í tinginum hevur givið loyvi til tað.

Skrivari og ráðgevi

Lýsingin eftir nýggjum skrivstovustjóra sigur m.a., at stjórin skal vera ráðgevi hjá løgtingsformanninum í øllum løgfrøðiligum og øðrum spurningum, og at hann skal vera dagligur fyristøðumaður á løgtingsskrivstovuni og hava ábyrgd sambært tingskipanini.

Í tingskipanini verður sagt, at hann – umframt omanfyri standandi – skal undir ábyrgd formansins skriva gerðabók løgtingsins. Tað hevur higartil verið uppgávan hjá teimum báðum tingmonnunum, sum hava verið valdir tingskrivarar, men síðani løgtingsskrivstovan varð sett á stovn í 1987, hevur skrivstovufólk skrivað gerðabókina, og so hava tingformaðurin og skrivarin kannað, at hon er rætt og skrivað hana undir.

Skal ferðast og hava við pengarnar at gera

Skrivstovustjórin verður skrivari hjá teimum føroyskum sendinevndum við løgtingsmonnum í Norðurlandaráðnum og Tingmannaráði Útnorðurs, hann verður skrivari og løgfrøðiligur ráðgevi hjá løgtingsnevndum, og hann skal ansa eftir, at øll tingmál eru løgfrøðiliga og málsliga rætt.

Í nýggju tingskipanini verður sagt í sambandi við nevndararbeiði, at skrivstovustjórin skrivar gerðabók í nevndunum, og sambært gerðabókini skrivar hann uppskot til nevndarálit, sum fatar um bæði meiriluta- og minnilutatilmæli. Síðani er tað uppgávan hjá nevndarformanninum at leggja uppskotið fyri nevndina.

Tað er uppgávan hjá skrivstovustjóranum at ávisa á Føroya Gjaldsstovu til gjaldingar allar útreiðslur hjá løgtinginum, geva og steðga lønargjaldsboðum til løgtingsmenn og starvsfólk á løgtingsskrivstovuni, og hann skal ansa eftir, at eingin útreiðsla verður hildin av skrivstovu løgtingsins, sum ikki hevur heimild í galdandi figgjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Alt samstarv hjá løgtingsformanninum og løgtingsmonnum við fyrisitingina hjá løgtinginum gongur um skrivstovustjóran.

Í lýsingini eftir nýggjum stjóra verður dentur lagdur á, at í samband við nýggju styrisskipannarlógina og nýggju tingskipanina er tað uppgávan hjá stjóranum at trygga, at bygnaðurin hjá skrivstovuni kann luka kravini í nevndu reglum, ið koma í gildi ólavsøkudag 1995.

Fyritreytirnar

Soleiðis sum uppgávusetningurin er orðaður í tingskipanini, ber tað illa til at ímynda sær, at sessurin sum skrivstovustjóri verður mannaður við fólki, sum ikki hevur løgfrøðiliga út-búgving.

Men í lýsingini eftir nýggjum stjóra verður tað ikki sett sum ein avgjørd treyt, at stjórin er løgfrøðingur. Har verður sagt, at »umsøkjarar eiga at hava lokið løgfrøðisligt embætisprógv ella at hava tilsvarandi útbúgving«.

Umframt fakligu útbúgvingina verður sagt, at skrivstovustjórin skal hava leiðsluroyndir frá almennari/politiskari umsiting, privatari umsiting ella løgfrøðiligum arbeiði, og hava skil fyri og innlit í at veita tænastur til verandi politisku skipanina, og skal hava góð samstarvs- og samskiftisevni.

Arbeiðsumstøðurnar

Skrivstovustjórin og hini starvsfólkini á løgtingsskrivstovuni hava higartil hildið til á Gamla apoteki, har flokkarnir og nevndirnar eisini húsast, men sambært álitinum um nýggja tingskipan, so fara umstøðurnar at batna.

Marita Petersen, Lasse Klein, Anfinn Kallsberg, Jákup Lindenskov, Hergeir Nielsen, Jógvan Sundstein, Agnar Nielsen og Hilmar Bech hava gjørt álitið. Tey eru ikki hvør sum helst í føroyskum politikki, og tá tey eru samd um niðanfyri standandi, so man tað liggja í ti, at nýggi skrivstovustjórin fær fleiri starvsfólk, og at tey fara at fáa rúmari hølisumstøður.

Um løgtingsfyrisitingina verður tikið soleiðis til í álitinum:

»Løgtingsfyrisitingin hevur nú ikki møguleika at virka til fulnar. Bygnaðurin er í høvuðsheitinum í lagi, men hóast tað ljóðar heldur biligt, so má tað vera sagt. Fyrisitingini tørvar fleiri fólk. Í minsta lagi eiga tveir juristar at vera í fyrisitingini. Haraftrat onnur køn fólk við skrivstovu- og fyrisitingarligum førleika. Manningin má kunna greiða løgfrøðiligu og fyrisitingarligu ráðgevingaruppgávuna, skrivarauppgávuna, bæði í tinginum og hjá nevndunum, parlamentariska norðurlandaráðsarbeiðið, skrivi- og skriv-stovuarbeiðið á løgtingsskrivstovuni og haraftrat tænastuarbeiðið fyri parlamentarikararnar.

Hølisviðurskiftini hjá bæði løgtinginum, umsitingini og politisku flokkunum eru í dag ikki nøktandi og neyðugt verður at bøta um umstøðurnar skjótast«.

Lønin

Starvið sum skrivstovustjóri verður lønt í 37. lønarflokki í tænastumannalógini, uttan tó at vera tænastumannastarv, men við eftirlønarskipan ella eftir sáttmála millum landsstýrið og avvarandi fakfelag. At talan er um eitt tænasstumannaliknandi starv og ikki tænastumannastarv, kemst av at tað bara er landsstýrið, ið sum arbeiðsgevari kann gera slíkan sáttmála.

37. lønarflokkur er tann sami, sum nógvir av almennu stjórunum verða løntir eftir. T.d. deildarstjórarnir í Tinganesi, sjúkrahusstjórin, stjórin á Almannastovuni, landsverkfrøðingurin, stjórin á Fiskirannsóknarstovuni, landsgrannskoðarin, landsskúlastjórin og rektararnir á studentaskúlunum.

Mánaðarlønin hjá nýggja stjóranum á løgtingsskrivstovuni er 26.639,91 krónur pluss eina viðbót upp á 2.586,83 krónur.

Tey, sum ætla sær stjórastarvið á løgtingsskrivstovuni, skulu stíla umsóknina til løgtingsformannin, og senda hana til Kristoffur Thomassen, skrivstovustjóra á løgtingsskrivstovuni. Umsóknirnar skulu vera komnar rættа viðkomandi í hendi innan 27. juli 1995.

Sambært nýggju tingskipanina er tað formansskapurin í tinginum, sum setur skrivstovustjóran. Í formansskapinum verða á ólavsøku valdir ein formaður og triggir næstformenn. Setanin av nýggjum stjóra verður ein tann fyrsta uppgávan, sum tey fara at avgreiða.

-nes



Frá farandi stjórin á løgtingsskrivstovuni, Kristoffur Thomasen, avmyndaður í tingsalinum saman við fráfarna ríkisumboðsmanninum Bent Klinte. Kristoffur hevur sitið í hesum starvi, frá tí at tað varð sett fyrstu ferð 1. apríl 1987, men fer frá 1. september komandi fyri aldur. Nú verður søkt eftir nýggjum stjóra, ið verður settur sambært treytunum í nýggju styrisskipanarlógini, ið kemur á gildi á ólavsøku

Mynd: Kalmar Lindenskov

Vestmanna-bjørgini



Ein bergtakandi túrur...

Nærri boð á
Tlf. 24305/ Fax 24292
G. Skúvadal

UMVÆLING

Allar umvælingar og alt sveisiarbeiði verður gjørt skjótt, væl og bíliga.

★ Bátamotorar (fastir og leysir)

★ Bilar

VIT GEVA TILBOÐ

PW VERKSTAÐUR
660 Søldarfjørður
Tlf. 42043 - 84243